SPEKT | statsaut. revisorar

Okkara tilv. 257JJ07-br003

Maskinmeistarafelagið
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórsahvn

25. oktober 2007

## Maskimeistarar í Grønlandi

Maskinmeistarafelagið hevur í telduposti dagf. 20. august 2007 spurt um ymisk skattlig viðurskifti hjá føroyskum maskinmeistarum, sum eru við grønlendskum skipum. Spurt verður um bústaðarviðurskifti, skatt, frádráttir og onnur gjøld so sum arbeiðsloysisgjøld (ALS), gjøld til barsilsgrunnin (BAS) og gjøld til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (AM-gjøld).

### *Bústaður í Føroyum ella Grønlandi*

Føroyskir maskinmeistarar kunnu búseta seg í Grønlandi, men tá ið tað ræður um skattaviðurskifti, er tað veruligi bústaðurin, sum er avgerandi fyri, hvussu viðkomandi persónur verður skattaður. Um persónur hevur bústað bæði í Føroyum og í Grønlandi, avgera ásetingarnar í tvískattasáttmálanum millum Føroyar og Grønland hvussu viðkomandi persónur verður skattaður.

Í tvískattasáttmálanum millum Føroyar og Grønland er ásett, at um persónur hevur tøkan bústað bæði í Føroyum og í Grønlandi verður hugt eftir hvørjum landi hann persónliga og fíggjarliga er mest knýttur at. Her verður m.a. lagdur dentur á, hvar familjan hevur bústað, hvar ið viðkomandi persónur fær inntøkur frá og hvar hann møguliga eigur ognir. Um ikki ber til at gera av hvørjum landi ein persónur er mest knýttur at fíggjarliga og persónliga, verða hugt eftir, hvar hann vanliga uppiheldur sær. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at t.d. ein postboks adressa í Grønlandi ikki verður roknað sum skattligur bústaður í Grønlandi.

Eftir føroysku skattalógini skal persónur, sum flytir uttanlands, frásiga sær bústaðarmøguleikan í Føroyum, fyri at hann kann sleppa fullu skattskylduni í Føroyum. Um persónur framvegis eigur hús ella íbúð í Føroyum, eftir at hann er fluttur uttanlands, verður kravt, at húsini ella íbúðin verða útleigað, meðan viðkomandi býr uttanlands.

## Um persónur hevur bústað í Føroyum

*Skattskyldug inntøka í Føroyum*

Um persónur er búsitandi og skattskyldugur í Føroyum, ásetur tvískattasáttmálin millum Føroyar og Grønland, at inntøka frá grønlendskum skipi skal skattast í Grønlandi eftir grønlendskum reglum. Men tá ið persónur hevur bústað í Føroyum, er tílík inntøka eisini skattskyldug í Føroyum, og skal uppgevast á føroysku sjálvuppgávuni saman við goldna skattinum í Grønlandi.

Tá ið skattaálíkningin verður gjørd í Føroyum, verður tann parturin av føroyska skattinum, sum lutfalsliga fellur á grønlendsku inntøkuna, frádrigin í endaliga skattinum, sum skal gjaldast í Føroyum. Hetta verður gjørt við niðanfyristandandi brøki:

grønlendsk inntøka / samlað skattskyldug inntøka * føroyskan skatt

Hetta merkir, at um føroyskur persónur <u>bert</u> hevur inntøku frá grønlendskum skipi, skal eingin skattur gjaldast í Føroyum. Men um viðkomandi persónur eisini hevur føroyska inntøku í sama ári, verður føroyska inntøkan skattað við tí skattaprosenti, sum samlaða inntøkan skuldi verið skattað við í Føroyum.

AM-gjald skal gjaldast í Føroyum av samlaðu skattskyldugu inntøkuni uttan mun til um talan er um inntøku, sum verður skattað í útlandinum ella ikki.

Útrokningin av føroyska skattinum kann vísast við niðanfyristandandi dømum:

<u>Dømi við einans grønlendskari inntøku:</u>

| | |
|---|---|
| Føroysk inntøka | 0 |
| Grønlendsk inntøka | 500.000 |
| Skattskyldug inntøka í Føroyum | <u>500.000</u> |
| Skattur av 500.000 | 221.700 |
| Frádráttur í skatti (500.000 / 500.000 * 221.700) | <u>221.700</u> |
| Skattur í Føroyum aftaná frádrátt (221.700 – 221.700) | 0 |
| AM-gjald (1,5% * 500.000) | 7.500 |
| Skattur og AM-gjald tilsamans | 7.500 |

Dømi við føroyskari og grønlendskari inntøku:

| | |
|---|---|
| Føroysk inntøka | 100.000 |
| Grønlendsk inntøka | 400.000 |
| Skattskyldug inntøka í Føroyum | 500.000 |
| Skattur av 500.000 | 221.700 |
| Frádráttur í skatti (400.000 / 500.000 * 221.700) | 177.360 |
| Skattur í Føroyum aftaná frádrátt (221.700 – 177.360) | 44.340 |
| AM-gjald (1,5% * 500.000) | 7.500 |
| Skattur og AM-gjald tilsamans | 51.840 |

Støddin á frádráttinum í føroyska skattinum er ikki treytað av, hvussu nógv ið er goldið í skatti í Grønlandi.

*Skattskyldug inntøka í Grønlandi*

Hjá persónum, sum búgva í Føroyum, verður inntøka frá grønlendskum fiskiskipi skattað í Grønlandi eftir grønlendskum reglum. Persónar við bústaði í Føroyum eru í hesum sambandi avmarkað skattskyldugir í Grønlandi. Sum avmarkað skattskyldugir í Grønlandi hava føroyskir persónar ikki rætt til frádrátt í Grønlandi fyri rentuútreiðslur ella inngjøld til eftirløn.

Persónar, sum eru avmarkað skattskyldugir í Grønlandi, hava ikki rætt til standardfrádrátt uppá 10.000 kr. ella persónsfrádrátt uppá 48.000 kr.

*Sosial gjøld*

Inntøka frá grønlendskum skipum verður ikki roknað sum A-inntøka í Føroyum, og tí hava persónar ikki skyldu at gjalda til ALS ella BAS av hesum inntøkum. Persónar, sum bert hava inntøku frá grønlendskum skipum, kunnu tó velja sjálvbodnir at skráseta seg at gjalda til ALS og BAS. Sjálvboðin skrásett gjalda árliga 3.000 kr. til ALS og 500 kr. til BAS.

Persónur skal hava goldið sjálvboðin til ALS í samanhangandi eitt ár, áðrenn hann hevur rætt til útgjald.

Allir persónar við skattskyldu í Føroyum skulu gjalda 1,5% av skattskyldugu inntøkuni í AM-gjaldi uttan mun til um inntøkan verður skattað uttanlands ella ikki. AM-gjaldið verður hækkað til 1,75% frá 1. januar 2008.

*Frádráttir í Føroyum*

Persónar, sum sigla við grønlendskum skipum, hava rætt til eftirlønarfrádrátt í Føroyum. Men um persónur bert hevur grønlendska fiskiveiðuinntøku, og harvið ikki skal gjalda skatt í Føroyum, hevur tað ongan skattligan fyrimun at gjalda til føroyska eftirlønarskipan. Hetta kemst av, at skatturin í Føroyum av grønlendsku inntøkuni frammanundan er 0 kr.

Persónar, sum sigla við grønlendskum skipum, eiga tí ikki at gjalda til føroyskar eftirlønar-skipanir, tá hetta kann viðføra, at eftirlønargjøldini í veruleikanum verða skattað tvær ferðir. Í fyrstu atløgu fær persónurin ongan skattligan ágóða av inngjøldunum, hvørki í Grønlandi ella í Føroyum, og í aðru atløgu verða útgjøldini frá eftirlønarskipanini annaðhvørt skattað sum vanlig inntøka, ella verður goldið avgjald uppá 35% ella 55%.

Persónar, sum sigla við grønlendskum fiskiskipum, hava rætt til sama frádrátt sum persónar við føroyskum fiskiskipum. Hesin frádráttur er í løtuni 14% av inntøkuni upp til 470.000, t.v.s. í mesta lagi 65.800 kr. Tó skal leggjast til merkis, at frádrátturin bert verður givin í grønlendsku inntøkuni, og hann hevur tískil ikki ta stóru ávirkan á føroyska skattin, av tí at grønlendska inntøkan í sjálvum sær ikki verður skattað í Føroyum.

Persónar, sum sigla við grønlendskum fiskiskipum, hava rætt til barnafrádrátt í Føroyum, um teir búgva í Føroyum og hava foreldramyndugleika yvir børnum undir 18 ár. Men av tí at grøn-lendska inntøkan í sjálvum sær ikki verður skattað í Føroyum fæst eingin ágóði av barnafrá-dráttinum. Møguligur barnafrádráttur eigur tí at verða fluttur yvir á hjúnafelagan ella annan persón, sum hevur foreldramyndugleika yvir viðkomandi børnum.

## Um persónur hevur bústað í Grønlandi

*Skattskyldug inntøka í Grønlandi*

Persónar, sum hava bústað og fulla skattskyldu í Grønlandi, skulu skattast í Grønlandi av fiskiveiðuinntøku frá grønlendskum skipum. Í tílíkum førum skal grønlendska fiskiveiðu-inntøkan ikki uppgevast í Føroyum.

*Frádráttir í Grønlandi*

Persónar við bústaði í Grønlandi hava rætt til frádrátt í grønlendsku inntøkuni fyri allar rentuútreiðslur av lánum, treytað av at lánið ikki er tryggjað við panti í fastari ogn uttanlands. Sostatt verður ikki givin frádráttur fyri rentur av láni til fasta ogn í Føroyum.

Persónar við bústaði í Grønlandi hava rætt til frádrátt í grønlendsku inntøkuni fyri gjøld til eftirlønartryggingar í grønlendskum ella donskum tryggingarfeløgum. Gjøld til føroyskar eftirlønarskipanir kunnu ikki frádragast í grønlendsku inntøkuni. Persónar við bústaði í Grønlandi, sum ikki fáa rentufrádrátt ella frádrátt fyri eftirlønartryggingar, kunnu í staðin fáa ein sokallaðan standardfrádrátt, sum í 2007 er 10.000 kr.

Í grønlendsku inntøkuni verður givin ein persónsfrádráttur uppá 48.000 kr í 2007.

Um persónur er búsitandi í Grønlandi, og ikki er skattskyldugur í Føroyum, og viðkomandi persónur bert fær inntøku frá grønlendskum skipi, skal hann ikki gjalda til ALS, BAS ella AM-grunnin í Føroyum.

Viðheft hesum skrivi er talva, sum vísir, hvussu inntøkur, frádráttir og sosial gjøld verða viðgjørd tá ið persónur annaðhvørt býr í Grønlandi ella Føroyum og hevur inntøku við grønlendskum fiskiveiðuskipi.

Um spurningar eru til omanfyristandandi er Maskinmeistarafelagið vælkomið at seta seg í samband við SPEKT.

Vinarliga
SPEKT statsaut. revisorar Sp/f

| | |
|---|---|
| Mirjam Haraldsen | Jákup Jacobsen |
| *statsaut. revisor* | *cand.merc.aud.* |